# *Bygdaráðsfundur*

**<u>Bygdaráðsfundur 22.03.2021 kl. 18.00</u>**

| | | |
|---|---|---|
| Fundarstað: | Fundarhøli | |
| Hjástødd: | Súni í Hjøllum | x |
| | Heini S. Kristiansen | x |
| | Høgni Hansen | x |
| | Elin á Torkilsheyggi | x |
| | Jan Højgaard | x |
| | Petur Jákup Petersen | x |
| | Rannvá í Túni Petersen | x |
| | Sigurd Justinussen, skrivari | x |

**<u>Til viðgerðar:</u>**

1. Mál nr. 37/2021 AFTURLATIÐ
2. Mál nr. 38/2021 Arbeiðsbil til havnarlagið ALMENT
3. Mál nr. 39/2021 Faroe Origin - Nýggjur leigusáttmáli ALMENT
4. Mál nr. 40/2021 AFTURLATIÐ
5. Mál nr. 41/2021 Umsókn um stuðul til Undirhúsið ALMENT
6. Mál nr. 42/2021 AFTURLATIÐ
7. Mál nr. 43/2021 Íbindingargjald til grundstykkir ALMENT
8. Mál nr. 44/2021 Fornminnisfelagið - Fíggjarætlan, ársroknskapur 2020 ALMENT
9. Mál nr. 45/2021 Frítíðarskúlin – longri opið og tilmeldingargjald ALMENT
10. Mál nr. 46/2021 AFTURLATIÐ
11. Mál nr. 47/2021 Viðgerð av innihaldinum í Umhvørvisnevndini ALMENT
12. Mál nr. 48/2021 AFTURLATIÐ
13. Mál nr. 49/2021 AFTURLATIÐ
14. Mál nr. 50/2021 Starvsfólk til reingerð á skúlanum ALMENT
15. Mál nr. 51/2021 Umsókn um leingjan av farloyvi ALMENT
16. Mál nr. 52/2021 Broyting av byggisamtykt, matr. nr. 415o og 415p ALMENt
17. Mál nr. 53/2021 Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 699bd ALMENT

# *Bygdaráðsfundur*

**<u>Mál nr. 38/2021 Arbeiðsbilur til havnalagið ALMENT</u>**

<u>J.nr. 2901-1-2021</u>

Arbeiðsbilurin, sum havnaumsjónarmaðurin hevur brúkt seinastu árini, er 15 ára gamal. Hann er áður nýttur til salting.

Bilurin er í ringum standi og tørvar stórar ábøtur, mettur kostnaður er uml. kr. 34.000.

Tekniska nevnd umrøddi spurningin, hvat er at gera og mælir til at selja bilin og nýta uml. 60.000-80.000 kr. netto til at útvega annan bil, ið hóskar til uppgávurnar hjá umsjónarmanninum.

**Á fundi 15.03.2021 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd, og at peningurin verður tikin av stovninum Viðlíkahald av bilum.**

**Tilmælini frá Teknisku- og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**<u>Mál nr. 39/2021 Faroe Origin - Nýggjur leigusáttmáli ALMENT</u>**

<u>J.nr. 803002-5-2020</u>

Í skrivi dagf. 28 apríl 2020 kemur skriv frá Jónfinni Thomsen, advokati. Hann umboðar Faroe Origin. Leigutíðin um leiguøkið er farin, og biður hann vegna eigarar um at fáa ein nýggjan dagførdan leigusáttmála gjørdan.

Hesum viðvíkjandi hevur umsitingin gjørt eitt uppskot um nýggjan sáttmála, sum fevnir um matriklarnar 437a og 437b, og partar av samlaða havnalagnum 435a.

Víddin á samlaða leiguøkinum er tað sama sum undanfarni sáttmáli, bert nakrar smærri dagføringar eru gjørdar. M.a, at leiguøkið burtur av samlaða havnarlagnum kann sigast upp av báðum pørtum eftir einum ári.

**Á fundi 26.08.2020 mælir Tekniska nevnd mælir til at leiguavtalan heldur fram sambært viðlagda uppskoti frá umsitingini.**

**Á fundi 26.08.2020 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd.**

**Tilmælið hjá Teknisku nevnd og Fíggjarnevndini bleiv einmælt samtykt.**

Í telduposti 23.02.2021 fær Nes kommuna sent eitt ískoyti til leigusáttmálan, sum Betri Banka krevur skal leggjast í leigusáttmálan.

**Á fundi 10.03.2021 mælir Tekniska nevnd til at fyrisitingin samskiftir við Betri banka og kannar grundarlagið fyri ískoytinum og at fyrisitingin fær heimild at avgreiða málið.**

**Á fundi 15.03.2021 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd.**

**Tilmælini frá Teknisku- og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 41/2021 Umsókn um stuðul til Undirhúsið ALMENT**
J.nr. 32102-1-2020

Undirhúsið á Toftum hevur sum kunnugt keypt ognina Toftavegur 2, matr.nr. 592 (Mathiasar pakkhús).

Undirhúsið vil við hesum søkja Nes kommunu um, at fáa lagt leiðingarnar s.s. kloakk, vatn, el og KT inn á matr.nr. 592, og bera kostnaðin av hesum.

Undirhúsið, sum heldur til í kjallaranum hjá Hanus Lómstein, Toftagjógv 6, fer um ikki so langa tíð at seta skjøtil á viðv. ístandsetan av ognini Toftavegur 2, sum kemur at verða komandi Undirhús á Toftum.

**Á fundi 09.03.2021 mælir Mentanarnevndin til, at Nes kommuna leggur neyðugu leiðingarnar og ber kostnaðin av hesum.**

**Á fundi 10.03.2021 mælir Tekniska nevnd til at taka undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.**

**Á fundi 15.03.2021 tekur Fìggjarnevndin undir við tilmælunum hjá Mentanar- og Teknisku nevnd, og at peningurin fer av vanligum rakstri hjá Teknisku deild.**

**Tilmælini frá Mentanar-, Teknisku- og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 43/2021 Íbindingargjald til grundstykkir ALMENT**
J.nr. 200002-2-2020

Tá grundstykkir vera frámatrikuleraði uttanfyri eina kommunala útstykking, er tað ein kommunal skylda at fáa til vega allar leiðingar til stykkið. Tað er: el, tele, kloakk, regnvatnsleiðing og drekkivatn.

Fyri hesa tænastu skal eigarin gjalda eitt íbindingargjald. Hettar gjaldið, sum hevur verið kr. 30.000 í fleiri áratíggir, eigur helst at endurskoðast.

Tað er sera kostnaðarmikið at útvega tær neyðugu leiðingarnar. Ofta kostar tað 2 til 3 ferðir verandi gjald. Hartil skal sigast, at hesi stykkini hava ein lægri kostnað enn tey, sum liggja í eini kommunalari útstykking.

**Tekniska nevnd mælir til at kanna málið nærri áðrenn tilmæli verður gjørt.**

Tekniska deild hevur spurt seg fyri aðrastaðni, hvussu tað verður praktiserað viðvíkjandi íbindingargjaldi. Ymsastaðni er einki íbindingargjald, men aðrastaðni er upphæddin langt frá tann sama sum í Nes kommunu. Hetta kemst av ymsum tillagingum, har gjaldið er lagt í t.d. fermetraprísin.

**Á fundi 10.03.2021 mælir Tekniska nevnd til, at fólk fyri jørð gjalda prísin frá Búnaðarstovuni, og at íbindingargjaldið hækkar frá kr. 30.000 til kr. 40.000.**

**Á fundi 15.03.2021 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Teknisku nevnd.**

**Tilmælini frá Teknisku- og Fíggjarnevnd vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 44/2021 Fornminnisfelagið - Fíggjarætlan, ársroknskapur 2020 ALMENT**
J.nr. 32102-4-2021

Ársaðalfundurin fyri 2020 hjá Fornminnisfelagnum og Bygdasavninum varð hildin 20.02.2021.

Nes kommunu hevur fingið Ársroknskapir hjá Fornminnisfelagnum og Bygdasavninum fyri 2020 til ummælis.

**Á fundi 09.03.2021 mælir Mentanarnevndin til at taka undir við ársroknskapunum hjá Fornminnisfelagnum og Bygdasavninum sum teir eru uppsettir.**

**Á fundi 15.03.2021 tekur Fíggjarnevndin undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini.**

**Tilmælini frá Mentanar- og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 45/2021 Frítíðarskúlin – longri opið og tilmeldingargjald ALMENT**

J.nr. 2002-1-2021

Um stutta tíð verður Frítíðarskúlin liðugt útbygdur. Ætlanin er, at hann skal hava opið fleiri dagar. Higartil eru frídagarnir hjá skúlanum fylgdir.

Opið skal verða:

- Í heystfrítíðini, 1 vika
- Dagarnir fyri jól ?
- Í páskafrítíðini ?
- Í summarfrítíðini ?

Fyri at dagurin skal verða skipaður so væl sum gjørligt, og Frítíðarskúlin skal vita, hvussu nógv starvsfólk skulu koma til arbeiðis hvønn dagin, hevði verið ynskiligt hjá Frítíðarskúlanum, at tey høvdu eitt tilmeldingarskjal, har foreldur teknaðu børnini ávísar dagar ella viku.

**Á fundi 09.03.2021 mælir Trivnaðarnevndin til, at eitt oyðiblað verður gjørt, har foreldur kunnu tekna børnini í heyst-, jóla-, páska- og summarfrítíðini í viku 26, 27 og 28. Kostnaður fyri at nýta hesa skipan er 400 kr. um vikuna. Tilmelding er bindandi.**

**Á fundi 15.03.2021 tekur Fìggjarnevndini tekur undir við tilmælinum hjá Trivnaðarnevndini.**

**Tilmælini frá Trivnaðar- og Fíggjarnevndini vóru einmælt samtykt.**

**Mál nr. 47/2021 Viðgerð av innihaldinum í Umhvørvisnevndini ALMENT**

J. nr. 22002-1-2021

Fyrsta málið hjá Umhvørvisnevndini verður at allýsa innihaldið, og hvørji mál nevndin skal seta sær.

**Á fundi 12.01.2021 mælir Umhvørvisnevndin til at viðgera, hvørjar broytingar kunnu gerast í kommunustýrisskipanini fyri Nes kommunu, soleiðis at innihaldið í nevndini verður greitt og kann leiða til góð úrslit innan umhvørvisøkið.**

Uppskot til broyting av kommunustýrisskipanini er viðfest, har Umhvørvisnevndin hevur fingið lýst, hvørji ábyrgdarøki eru viðkomandi fyri nevndina.

**Á fundi 09.02.2021 mælir Umhvørvisnevndin til at broyta heitið á nevndini til Burðardygd og arbeiða víðari við uppskotinum um broyting av kommunustýrisskipanini í mun til Umhvørvisnevndina.**

Uppskot til broyting av kommunustýrisskipanini er viðfest, har nevndin Burðardygd hevur fingið ítøkilig árbyrgdarøki at umsita.

**Á fundi 09.03.2021 mælir nevndin Burðardygd til at taka undir við broytingini av kommunustýrisskipanini.**

**Tilmælið frá nevndini Burðardygd er einmælt samtykt.**

**Á fundi 12.01.2021 mælir Mentanarnevndin til at savna saman hugskot til at skipa Várdagarnir, við atliti at tilmælum viðvíkjandi korona.**

Hugskot um skránna fyri Várdagin fyriliggur.

**Á fundi 09.03.2021 mælir Mentanarnevndin til at taka undir við skránna fyri Várdagin.**

**Tilmæli frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 50/2021 Starvsfólk til reingerð á skúlanum ALMENT**

J.nr. 2701-1-2021

Nes kommuna hevur søkt eftir vaskifólki í fimleikahøllini at byrja skjótast gjørligt.

Lýst hevur verið 15.02.2021.

Tá umsóknarfreistin var úti, vóru 6 umsóknir innkomnar.

Umsjónarmaðurin í skúlanum hevur gjørt innstilling, sum Mentanarnevndin valdi at fylgja.

**Á fundi 09.03.2021 samtykti Mentanarnevndin at seta Alis Jacobsen í starv sum vaskifólk í fimleikahøllini.**

**Samtyktin frá Mentanarnevndini var einmælt staðfest.**

**Mál nr. 51/2021 Umsókn um leingjan av farloyvi ALMENT**

J.nr. 8101012-3-2020

Í teldubrævi 07.03.2021 søkir Alis Jacobsen um at leingja hennara farloyvi frá starvinum sum vaskifólk í skúlanum. Hon ynskir at hava farloyvi til apríl 2022.

**Á fundi 09.03.2021 mælir Mentanarnevndin til at leingja farloyvi fram til apríl 2022.**

**Tilmælið frá Mentanarnevndini var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 52/2021 Broyting av byggisamtykt, matr. nr. 415o og 415p ALMENT**

J.nr. 1203-1-2021

Í sambandi við at áhugi er at byggja á matr.nr. 415o og 415p, er neyðugt at broyta byggisamtyktina fyri nevndu matriklar frá at vera A til A2, sum loyvir íbúðarbygging.

Áseting fyri Øki A a) er:
Økið verður nýtt til miðstaðarøki, t.e. til tænastumerktar fyritøkur sum umsiting, handlar, skrivstovur, heilsubótastovu, stovnar, fornminni, tún, parkering og tílíkt.

Áseting fyri Øki A2 a) er:
Økið verður nýtt til miðstaðarøki, t.e. til tænastumerktar fyritøkur sum umsiting, handlar, skrivstovur, heilsubótastovu, stovnar, fornminnir, íbúðir og líknandi.

**Á fundi 10.03.2021 mælir Tekniska nevnd til at at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 415o og 415p frá at vera A-øki til A2-øki.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**

**Mál nr. 53/2021 Umsókn um byggiloyvi til sethús á matr. nr. 699bd ALMENT**

J.nr. 1201-1-2021

Í umsókn móttikin 07.03.2021 søkja eigararnir av matr. nr. 699bd, Jørgin og Karin Davidsen, um byggiloyvi til sethús.

**Á fundi 10.03.2021 mælir Tekniska nevnd til at lata byggiloyvi til matr. nr. 699bd eftir galdandi byggireglugerð og ávísing av Teknisku deild.**

**Tilmælið frá Teknisku nevnd var einmælt samtykt.**